## Tekniski Skúlin í Tórshavn søkir lærarar

**Lærari til el-deildina**

Starvið, sum er eitt **fulltíðarstarv**, umfatar undirvísing á el-deildini.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum elektrikari, hava prógv sum el-installatørur og minst 2 ára starvsroyndir innan yrkið. Umsøkjarar við hægri útbúgving hava fyrimun. Eisini er áhugi fyri støðd-, alis- og evnafrøði, og nýtslu av EDV, ein fyrimunur.

**Tímalærari til el-deildina**

Starvið er **tímalærarastarv** á el-deildini, við møguleika fyri føstum starvi seinni.

Umsøkjarin skal hava sveinabræv sum elektrikari, hava prógv sum el-installatørur og minst 2 ára starvsroyndir innan yrkið. Umsøkjarar við hægri útbúgving hava fyrimun. Eisini er áhugi fyri støðd-, alis- og evnafrøði, og nýtslu av EDV, ein fyrimunur.

**Setanarkor til fast starv:**

Fyrstu tvey árini verða roknað sum royndartíð, har tann, sum verður settur í fast starv, má vera til reiðar at taka ta eftirútbúgving, tað verður seg pedagogiska/undirvísingarliga ella aðra førleikagevandi útbúgving, sum er neyðug fyri at verða settur í fast starv.

**Løn:**

Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

Størvini skulu setast skjótast tilber og í seinasta lagi 1. august 2000.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving, viðmælum og starvstíð skal vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 28. juni 2000.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlan, tlf. 31 19 57.

**Tekniski Skúlin í Tórshavn**
Marknagilsvegur 75 • P.o.b. 239 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 31 19 57 • Fax +298 31 66 21
E-mail: tst@post.olivant.fo

## Landsfelag Føroyinga í Útbúgving

LFÚ

Tinghúsvegur 18, Postrúm 136, FO-110 Tórshavn, Tlf. 310220, Fax 315037
lfu@post.olivant.fo, www.lfu.fo

### Summarfrítíð

Skrivstovan er stongd frá 19. juni 2000 til 31. juli 2000. Frá 1. august 2000 verður opið týsdag, hósdag og fríggjadag kl. 15.00–18.00.

Ráðgevingin er í juli mánaða bert opin týsdag kl. 16.00–18.00. Frá 1. august 2000 verður opið týsdag og hósdag kl. 16.00–18.00.

## TÆNARA-LÆRLINGUR
### *Á HOTEL HAFNIA*

Vit sóknast eftir umsøkjarum til lærlingastarv sum verður sett til heystar



*Tað krevst, at umsøkjarin:*
- er fyrikomandi
- er álítandi
- kann arbeiða sjálvstøðugt og skjótt
- hevur yvirlit
- dugir at samstarva
- hevur lokið "Tek 2" innan hotel- og matstovuøki (møguleiki verður at ogna sær eitt "Tek 2"-prógv á "Hotel & Restaurantskolen" í Keypmannahavn ella Ålborg í døgunum 1. aug. til 30. okt.)

Útbúgvingin sum tænari gevur stórar framtíðarmøguleikar, bæði her heima og í útlondum. Útbúgvingin gevur næmingum hollan kunnleika innan nógv ymisk øki. T.d. læruna um vín, øl, spiritus, kaffi o.s.fr.

Harafturat lærir tú fakorð á fleiri málum, sølu og tænastu, rokniskap, teldufrøði, matgerð og útskering av ymsum kríatúrum, fiski og fugli.

*Nærri upplýsingar kunnu fáast við, at venda sær til:*
Rósu Mariu R. Brodersen
ella
Michael Jensen

**P/F Hotel Hafnia**
Tel 31 32 33 • Fax 31 52 50

HOTEL HAFNIA

## LUTASEÐIL



1. Toyota Corolla Hatchback (Frá Reyni Service) — virði 169.400 kr.
2. Ferð fyri 2 vaksin og 2 børn við bili Tórshavn-Hanstholm við frítíðaruppihaldi í 1 viku í Danland (Frá Smyril Line) — virði 15.000 kr.
3. Gávukort frá Th. Dam á Hálsi — virði 10.000 kr.
4. Gávukort frá Shell — virði 5.000 kr.
5. Gávukort frá Statoil — virði 5.000 kr.
6. Gávukort frá Statoil — virði 5.000 kr.
7. Gávukort frá Statoil — virði 5.000 kr.
8. Gávukort frá Statoil — virði 5.000 kr.
9. Apex ferðaseðil fyri 1 persón — virði 2.800 kr.
10. Føroyskt krov — virði 1.000 kr.

Drigið verður bara millum seldar seðlar. Drigið verður mánamorgunin 7. august kl. 9.30 á Elektron og lýst í bløðunum 8. og 9. august 2000.
Eisini verða vinnaratølini løgd út á heimasíðu: www.sporthal.fo

Hestprent 314 555

STATOIL

**Tórshavnar Ítróttarráð 2000 — 20 kr.**

LIFTON



**Hydraulikkhamarar 10-30 kg**
*Mobilar drívstøðir*
*Lítlar og handingar*
*Høgan effektivitet*
*Ristast lítið*
*Fleksibul íbinding*

Sosialurin - 311820

Leverandørurin til entreprenørar í 28 ár. Tosið við okkum!
**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

**Norðurlandahúsið í Føroyum**

*Sí SVF tekstvarp s. 650*

Pisan er komin!

Árliga blaðið - Pisan - frá Meginfelag Føroyskra Studenta er útkomið.

Pisan hevur til endamáls at vegleiða ung, ið ætla sær undir víðari lestur í Føroyum ella uttanlanda.

Blaðið viðgerð spurningar um m.a. studning, bústað, skatt, føroyafrádrátt og hernaðarskyldu. Eisini eru greinar um lívið sum lesandi, bæði í og uttanfyri skúlan.

Pisan fæst ókeypis á øllum miðnámsskúlunum og á ymiskum øðrum skúlum, so sum Sjúkrasystraskúlanum, Fróðskaparsetrinum og handilsskúlunum, umframt á m.a. Stuðulsstovninum, LFÚ, ALS, Almannastovuni og bókasøvnum.

MFS




*Halt* **sosialin**






**Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum: www.sosialurin.fo**

# Flóvin Tór Næs føroyameistari

*Talv: Dramatikkurin var í hæddini í seinasta talvinum í umdystinum. Hjá Flóvini varð hálvt stig nokk at krúnast føroyameistari og sjálvt um John Rødgaard trýsti alt talvið so varð hann ov stuttur. Javnleikur varð úrslitið og Flóvin er sostatt fyrsti føroyameistari í nýggju øldini*



*Hálvt annað stig í trídystinum um FM-heitið var nóg mikið hjá Flóvini, sum sostatt gjørdist føroyameistari 2000*
***Mynd: Álvur Haraldsen***

Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Heilt nógv fólk høvdu leitað sær oman í Hotel Hafnia hvítusunnudagin at fylgja talvinum millum Flóvin Tór Næs og John Rødgaard. Eisini vórðu øll trý talvini send beinleiðis út á alnetið á heimasíðunum www.samteld.fo/talv og www.hafnia.fo, og í miðal hevur alnetshyggjaraskarin ligið um 300 um dagin og tað prógvar hvussu talvvinarligur hesin nýggi miðil er.

Støðan var greið undan hesum seinasta talvinum, nevnliga tann at John mátti vinna fyri at koma ájavnt við bæði Flóvin og Torbjørn, og tað hevði viðført ein enn longri umdyst millum teir tríggjar. Vann John ikki, ja so varð Flóvin nummar eitt.

Men vit fara at byrja við tí fyrsta talvinum sum varð telvað fríggjadagin millum Torbjørn og Flóvin. Torbjørn legði varisliga út við hvíta fólkinum og tað viðførdi at Flóvin útjavnaði heilt skjótt og kom í miðspælinum at standa betur.

Tá endaspælið nærkaðist hevði Flóvin kroyst Torbjørn saman og spurningurin var bert um tíð nær bundið varð um posan. Men tað sum oftani hendir tá ein hevur nógvar góðar leikir at velja ímillum er, at ein ikki ansar sær ov væl. Og tá Flóvin leikti Rc2 helt hann ivaleyst at tað var bara ein av fleiri góðum leikum hann hevði, men so var ikki. Torbjørn var tá skjótur, ofraði bispin og fekk rikið kongin hjá Flóvini úr tryggleikanum. Tá so Torbjørn hevði møguleikan at gera avgerandi leikin, sum møguliga hevði ognað honum javnleikin, valdi hann skeiva leik og eftir tað vann Flóvin lættliga.

Hetta varð eitt talv har Torbjørn ivaleyst hevði ov nógva respekt, byrjaði heldur varisligari enn neyðugt og fekk tí aldrin fótin fyri seg. Sjálvt um Torbjørn hevði ein møguligan javnleik við hendur var Flóvin rætti vinnari av hesum fyrsta talvi í umdystinum.

### Torbjørn respektleysur

Vísti Torbjørn respekt í fyrsta talvinum so var søgan ein heilt onnur í talvinum móti John leygardagin.

Torbjørn segði sjálvir eftir talvið, at hann hevði einki at tapa og fór tí respektleysir eftir sigrinum. John fór somuleiðis eftir sigrinum, men hansara støða var eitt sindur annarleiðis við tað, at hann "skuldi" vinna. John var ein náttúrligur favorittur undan talvinum, men eftir 41 leikum og fýra tímum sótu fólk nærum við opnum munnum tá ratingfavoritturin gavst. Talvið var sera opið, John hevði yvirtakið í sentrumi, meðan Torbjørn royndi at skapa eitt kongaálop.

John var sum vanligt í tíðarneyð, men sum leikur leið steðgaði álop Torbjørns upp og mátti hann pent bakka við frúnni. Nógvir taktiskir møguleikar lógu enn í støðuni, teir flestu átti Torbjørn, og við tíðneyðini hjá John í huga royndi hann eina síðstu roynd at endurvinna álopið. John sá ikki vandan, tók ímóti finnunum Torbjørn ofraði og tá varð galið. Við hesum finnuoffrum opnaði Torbjørn hvítu kongastøðuna og vann tá forserað! Sera gott telvað av Torbirni sum nú bert er annar av teimum sum hevur vunnið John við svarta fólkinum.

### Flóvin var kaldur

Í trimum teimum seinastu FM einstaklingakappingunum hava Flóvin og John leikt javnleik, og við tí í huga var sannlíkt at Flóvin fór at standa royndina og harvið gerast føroyameistari. Millum nakrar áskoðarnar var tó meint at John kundi klára hesa uppgávu, eftirsum hann í FM´98 vann við svarta fólkinum móti Heina Olsen í síðsta umfari og kom sostatt tá ájavnt í stigum við Heina. Og sum talvið leið sást at John spakuliga fekk tryggjað sær ein fyrimun og fór tá í kongaálop við frúnni, báðum rókunum, bispi og finni. Flóvin vardi hegnisliga sum viðførdi at John satsaði, og endin varð, at John misti eina finnu og kundi tá ikki vinna telvaði Flóvin rætt. Tá analyserað varð eftir talvið, hevði John onkrar góðar leikir, sum møguliga hevði broytt støðuna. John royndi eitt sindur aftrat í endatalvinum, men har var einki at gera.

Teir samdust um javnleik. Um nakar átti at vinna endatalvið, so var tað Flóvin, men ikki varð tað neyðugt fyri at gerast føroyameistari. Javnleikurin var nóg mikið.

Vanligani er tað fyrimunur at hava hvítt í talvi, men í hesum trýmansumdysti vann eingin við hvíta fólkinum. Svarta fólkið fekk tvey og eitt hálvt stig, meðan hvítur fekk bert hálvt stig.

### Endastøðan varð hendan

| | |
|---|---|
| FM Flóvin | 1,5 stig |
| Torbjørn | 1 |
| John | 0.5 |

Flóvin telvaði best í hesum umdysti, tað eru øll samd um. Ivaleyst hevur nógva telvingin hjá Flóvini síðsta árið givið honum íblástur og dirvi, og gjørt hann til ein betri telvara. Tað eina málið hjá Flóvini er nú rokkið, nevnliga at gerast føroyameistari, tað næsta málið er ein IM normur, segði ein fegin og lættnaður Flóvin eftir umdystin.

-Eg kom púra frístillaður til umdystin, og eri sera nøgdur og glaður fyri mítt úrslit, segði Torbjørn eftir umdystin. Og tað er væl skiljandi, Torbjørn yvirraskaði nevnliga teir flestu við øðrum plássinum.

Eingin hevði væntað hesa endastøðu við John sum aftasta mann, men so varð og sjálvandi var John skuffaður um úrslit sítt. Men hann ætlar sær helst at koma sterkt aftur í næsta ár, tá FM einstaklingakappingin verður í Vestmanna.

Tiltakið eydnaðist sera væl, sum sagt vóru fleiri hundrað sum fylgdu talvunum beinleiðis á alnetinum. Eftir umdystin varð steypahandan og virðislønir vórðu givnar telvarnum, eisini fingu teir blómutyssi. Formaður Talvsambandsins, Rani Nolsøe handaði lutirnar. Hann helt at hesin umdystur var sera spennandi og takkaði telvarnum fyri teirra stríðsanda teir vístu. Rani nýtti somuleiðis høvi at takka Hotel Hafnia fyri tær sera góðar umstøður sum fyriskiparar, telvarar og áskoðarar fingu undir umdystinum. Eisini takkaði hann Føroya Tele fyri stuðul

Talvini, sum teir tríggir telvaðu í FM-umdystinum eru at siggja á síðu 24
.



*Luttakaranir í FM umdystinum 2000: F.v. IM John Rødgaard, Torbjørn Thomsen og Flóvin Tór Næs*
***Mynd:Álvur Haraldsen***